## DAGSINS MEINING

# Koyrandi av Viðareiði til Gásadals

**- ferðslumentan og framtíðar avbjóðingar**

Tað kann tykjast eitt sindur løgið, at um somu tíð sum nógv hevur verið tosað um avleiðingar av eini møguligari oljuvinnu - hóast vit enn ikki hava gjørt lønandi fund - verður einki tosað um tær mongu nýggju og stóru avbjóðingar, ið vit vita koma í kjalarvørrinum á teimum risastóru milliardaíløgunum samfelagið ger í løtuni og komandi árini. Her er talan um tveir undirsjóvartunlar, ið fara at nærkast milliardini og um skipaíløgur – nýggjur Smyril og nýggj Norrøna – fyri enn eina milliard. Tað er greitt, at so stórar íløgur, sum føroyska samfelagið ikki hevur sæð makan til áður, fara at hava avleiðingar fyri okkum øll, uppá gott og ilt. Tær fara at seta nýggj og stór krøv. Tí er tað sera undrannarvert fyri ikki at siga ábyrgdarleyst, tá hvørki politikarar ella onnur í samfelagnum viðgera hesar komandi broytingarnar í størri mun.

Lat okkum her halda okkum til undirsjóvartunlarnar. Um ikki so langa tíð verður koyrandi úr Fuglafirði til Bíggjar, og skjótt eisini til Gásadals. Tað verður so helst longsti teinurin, sum koyrast kann út í eitt og um ikki minni enn tríggjar oyggjar. Hetta verður ein stór avbjóðing fyri ferðsluna, og í hesum sambandi mugu vit til at tosa um, hvat kann gerast fyri at forða fyri, at talið av skaðum fer at vaksa. Tí vill fleiri undirsjóvartunlum fer okkara ferðslunet og ferðslumentan fullkomiliga at broytast. Um ikki so nógv ár verður t.d. koyrandi av Viðareiði til Gásadals. Her verður serstakliga hugsað um ungdómin. Avmarkaðu møguleikarnir í sambandi við frítíðavirksemi úti á bygd fara at hava við sær eina vaksandi ferðslu, har ungdómar fara at koyra úr einum enda av landinum í annan. Hetta merkir fleiri óhapp, fleiri skaðar og fleiri mist mannalív. Henda sannroynd – at vit fáa undirsjóvartunlar og at ferðslunetið økist - eigur at fáa okkum tað verið seg myndugleikar, løgreglu, Ráðið fyri Ferðslutrygd, tryggingarfeløg o.o. longu nú at seta út í kortið ein framtíðar ferðslumentanarpolitikk undir heitinum: Hvussu vilja vit taka ímóti eini øktari ferðslu serstakliga við ungum bilførarum, tá undirsjóvartunlarnir knýta fleiri oyggjar saman!

Hetta kundi ikki minst verið ein uppgáva hjá Ráðnum fyri Ferðslutrygd, sum annars ger eitt stórt og gott upplýsandi arbeiði. Men harfyri eiga vit framhaldandi at seta okkum nýggj mál og mið og her serstakliga, tá umstøðurnar broytast so kollveltandi, sum tá vit fáa ein undirsjóvartunnil millum Vágarnar og Streymoynna og seinni ein millum Borðoy og Eysturoy. Vit eiga at spyrja okkum sjálvi, hvat hetta t.d. krevur av løgregluni! At fleiri oyggjar verða knýttar saman, soleiðis at ungdómur kann koyra av Viðareiði til Gásadals er ein so stór og kollveltandi broyting og avbjóðing, at allar góðar kreftir eiga longu nú at seta hetta fremst á dagskránna. Hetta má seta nógv størri krøv til okkara ferðsluporiti, og eisini má ferðslumentanin við hesi nýggju avbjóðing fáa størri innivist í skúlunum. Tað skal vera okkara vón, at allar góðar kreftir raðfesta hetta høgt í komandi tíð.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Løgtingsvalið 2002. Hvat segði veljarin?

**Atli Gregersen**

Løgtingsvalið 2002 var ein stuðul til framhaldandi at menna sjálvbjargni av føroysku tjóðini. Tann sitandi samgongan fekk 16 tingmenn og Miðflokkurin, sum stuðlar tjóðskapartilgongdini fekk 1 tingmann. Javnaðar- og sambandsflokkurin fingu 15 tingmenn.

Støðan er sostatt greið. Samgongan fekk uppbakking til at halda áfram við sínum politikki. Summi siga, at samgongan fekk eitt nevs frá veljarunum. Hetta er ikki rætt! Tá sambandsvongurin tapti valið, skal stórt hugflog til at siga, at hann vann valið.

Annars kann ein leggja afturat, at tað altíð kostar at sita í samgongu, sostatt var úrslitið hjá andstøðuni rætt og slætt vánaligt. Eg vil siga, at teir fingu ein frammaná.

Hví sjálvstýris- og fólkaflokkurin, nú vilja saðla um og steðga sjálvbjargnistilgongdini er ikki at fata. Teir fingu eitt ja frá veljaranum. Teir mugu hava ring oyru, tí teir siga at veljarin segði nei. Hann segði jú ja.

At hesir flokkar nú vilja fara í samgongu har samlaða niðurlagingin av donskum ríkisveitingum bert skal vera umleið 25 milliónir er løgið. Tað er rætt og slætt ein søgulig katastrofa. Tykkara trúvirði fýkur. Partvís nútíðin, men serliga ettirtíðin fer at øtast og spyrja hví?

Um tit ynskja eina breiða samgongu, má ferðin í sjálvbjargnistilgongdini sjálvandi minkast. Tað er ivaleyst rætt at hava fleiri við á ferðini, men um úrslitið verður tað, ið nú frættist um, at nógv eru tilmeldaði, men at ferðin er avlýst, so er betri at færri eru við, og at ferðin verður gjøgnumførd.

Klokkan er ikki farin um 12 enn.

# Meirilutin av Føroya fólki ynskir at fullveldistilgongdin heldur fram

**Abraham Mikladal**

Meirilutin av Føroya fólki ynskir at fullveldistilgongdin heldur fram.

Ferð aftaná ferð verður fórt fram, serliga av Javnaðarflokkinum, at úrslitið av løgtingsvalinum var at Føroya fólk ynskti at steðga fullveldistilgongdini.

Men hetta er ikki so, hygg bert eftir valúrslitinum:

| | | Samband | Fullveldi |
|---|---|---|---|
| A | Fólkaflokkurin | | 6.352 |
| B | Sambandsflokkurin | 7.954 | |
| C | Javnaðarflokkurin | 6.378 | |
| D | Sjálvstýrisflokkurin | | 1.351 |
| E | Tjóðveldisflokkurin | | 7.229 |
| H | Miðflokkurin | | 1.292 |
| | Atkvøður ialt | 14.332 | 16.224 |
| | Prosentvís | 47% | 53% |

Fólkaflokkurin vil ikki at taka hesa støðu til eftirtektar. Ístaðin verður farið eftir einari breiðari samgongu, har Javnðar- ella Sambandsflokkurin koma afturat (les báðir skulu við og Tjóðveldis-flokkurin skal út).

Tað at víðka verandi samgongu við einum stórum flokki heldur enn Miðflokkinum, sær ógvuliga rímuligt út og er kanska ein vøra, ið er løtt at selja til Føroya fólk. Men hvat uppnáða vit við hesum?

**Svarið er stutt: - bert afturstig**

Tjóðveldis-, Sjálvstýris-, Mið- og Fólkaflokkurin saman, megna minst líka so væl, faktiskt betri enn nakar annar, at gera tær ábøtur og útbyggingar, ið eru neyðugar í samfelagnum.

Tað er prógvað í farna valskeiði og eisini undir teimum samráðingum, sum nú hava verið. Skuldi Javnaðar- ella Sambandsflokkurin (ella báðir) komið uppí landsins stjórn hevði sostatt einki størri framstig verið á t.d. trivnaðar- og vinnuøkinum, men bert eitt afturstig í fullveldistilgongdini. Og tað ynskir Føroya fólk ikki.

At Fólkaflokkurin partú vil hava eina ABC ella "aller nádigst" eina ACE samgongu, skyldast at nakrir "sambandstingmen" úr flokkinum krevja tað. Vónandi fær Anfinn hesar til fornuft.

Stig fyri stig kann eisini verða eitt afturstig, tá tað gongur so seint, at málið verður mist úr eygsjón.


**Sosialurin**

Stovnaður: 1927

**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo

**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Tiðindaleiðari:**
Justinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Friggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Sjálvstýrishugur

**Mannbjørn Jacobsen**

Í Føroyum er tað ein heiður at vera sjálvstýrissinnaður, bara í sær sjálvum. Tað borgar fyri framburðshugi, fosturlandsalski, demokratiskum sinnalagi, mentan, evnum, arbeiðshugi.

Snøkt sagt eginleikar, sum í øðrum londum skulu báðar politisku síðurnar til at røkka.

Harafturímóti er at vera sambandssinnaður borgan fyri at vera politisk dølskur, bara í orðum demokratiskur, fosturlandskærur uppá gjøt, afturhaldssinnaður av náttúru, siðaleysur, bara javnt evnaligur ella minni, minst møguliga arbeiðshugaður.

Eginleikar, sum hvørgin síðan, høgra, vinstra, kennist við í øðrum londum. Men søgugranskarar av miðøldini kenna øll hesi eyðkennini aftur. Tað vóru tey, sum gjørdu miðøldina so longi varandi.

**Sjálvstýrisoyggjar**

Í Føroyum hevur sjálvstýrishugurin flutt seg eitt sindur síðan toganin sjálvstýri, samband kom í um jólafundin 1988 og aftaná.

Trygga miðstøðin fyri sjálvstýri hevur midoyggjin í Føroyum Sandoyggin altíð verið. Har hevur síðan politiska floksbýti í 1906, verið fastur sjálvstýrishugur í í hvussu so er einum sjálvsstýrispolitikkara, viðhvørt báðum umdømismøguleikunum.

Í byrjanini av politisku floksbýtinum var oyggin yvirhøvur sjálvstýrishugað.

Stóra sjálvstýrisoyggin frá byrjan av floksbýtinum, enn virkandi í dag, var Vágoyggin. Heimaoyggin hjá stórum fosturlandsyrkjarum sum Mikkjal Dánjalsson á Ryggi og øðrum til. Til valið 1906 og nøkur ár fram atkvøddi øll oyggin sjálvstýri so at siga, friðarval var onkuntíð, tí ongin stillaði upp fyri sambandsflokkin. Okkurt val atkvøddu øll í Sandavági á sjálvstýrisflokkin, fyri skomm skyld atkvøddu nøkur fá seinni á samband har, men so hevur spekuliga yvir ártýggir hála eitt sindur hin vegin, tó so at sjálvstýri altíð var valdandi.

Hetta er fyrst nú álvarsliga við at vikna nú sjálvstýrishugsjónin er um at verða framd í politiskum verki. Kanska er tað politiska síðan, sum ger munin. Tjóðskapurin var mentanarligur. Kanska er tað bara skaðilig heilsuráð. Heiðurin er enn at verða sjálvstýrissinnaður, skommin samband.

Streymoggin í tveimum valdømum hevur til helvtar týlja verið sjálvstýrisoyggj.

Norðara helvt við høvuðstøð um Vestmanna hevur altíð havt sjálvstýrisumboð í tinginum síðan 1906. Hetta búskaparligur framburðshugi hjá nøkrum av stórstu vinnulívsmonnum okkara og landskærum yrkjarum í Kvívík at takka.

Fyrst nú høttir sjálvstýrishugurin at linka, nú vunnið er uppundir land.

Suðurstreymoy við høvuðssæti í høvuðstaði okkara Tórshavn hevur á nógvan hátt verið avgerandi fyri lagnu okkara í tjóðskaparspurninginum, sum onki løgið er í.

Her hevur afturhaldi havt eyka møguleika, at festa seg.

Umsiting og høvuðshandil, upprunaliga einhandil, var her, við bara umboðanum út um oyggjarnar í embætismonnum, prestum, oftast danskir, og úthandlum.

Høvuðshvørkatakið hevur verið her í danskari ávirkar í donskum embætismonnum, handilsmonnum. Tá hetta linkar, lutvís av sær sjálvum av demokratisku broytingunum í Danmark um miðjan næstseinastu øld, og hangandi byrjandi tjóðskaparveking í Føroyum, flytist sjálvstýrishugur yvir í størri fjøld, fyrst í Havn, so aðrastaðir við í Føroyum.

Í 1946 vísti Havnin seg at standa mát. Tað eru stórum fosturlandsyrkjarum sum HA Djúrhus og øðrum við fyri at takka fremst.

Staðurin hevur síðan verið javnt sjálvstýrissinnaður.

Eysturoyggin er í dag javnt sjálvstýrisoyggj. Hetta hevur ikki altíð verið so. Til 1946 var sunnara størra helvt við Fuglafirði avkøvt samband.

Afturhaldið hevur tíðlja sað týdningi í at seta sambandsembætismenn á hesa vinnuliga týdningarmiklu og fólkaríka miðstøði í Føroyum.

Vinnuligi framburðurin í Føroyum ikki minst um Skálafjørðin og hvøkkurin við fólkaatkvøðuni, sum óvæntað setti Eysturoynna uttanfyri meginúrslitið saman við Suðuroynni, førdi til skifti.

Norðari minni helvt av Eysturoynni við Gjógv hevur altíð helt meir til útnorðuroyggjar, tað sjálvstýrisbjarta vunnið. Sunnara helvt um Skálfjørð vendi móti Havnini og Danmark, tí var so longi samband har. Bond millum kongsbøndir her um Kongshavn og kong vóru avgerandi longi. Eitt skifti er helst við løgtingsyvirtøkuni av kongsjørðini.

Norðuroyggjar vóru skjótt sjálvstýrisoyggjar burturav, í fyrsta hevði sambandsafturhald hug at festa seg, men mikla búskapar framburðinum fyri at takka, framtaksmonnum yvir vanliga stødd, hava tær síðan verið sjálvstýrissinnaðar, er sjálvstýrisháborgin.

Har er føst sjálvstýrisyvirvág í dag. Sum oftast er sambandsmøguleikin úti úr løgtinginum, ikki altíð úti úr landstýrinum.

Suðuroyggin er í dag, at vísa seg, til helvtar sjálvstýrissinnaðar. Hetta hevur so langt frá altíð verið so.

Trygga støði fyri sambands og sambandsávirkan aðra staðir í Føroyum við var longi Suðuroyggin. Fjarstøðan. Eitt eitt sindur annaðleiðis fólk, sum hevði hug at kennast fult so væl við útlendingar sum føroyingar, norðingar, er helst orsøkin.

Stórur búskaparligur framburður sum úrslit av fiskimarksútflytingini, heimaútróðri, hevur stóran lut í skiftinum.

**Sjálvstýrisfólk**

Í skjótt hundrað ár, frá 1906, hevur sambandshugurin mist takið í øllum oyggjunum í Føroyum. Fyrst Vágoyggini og Sandoyggini, so Norðuroyggjum, skjótt aftaná Streymoynni, so aftaná kríggið Eysturoynni og nú seinast Suðuroynni.

Sambandshugur hevur hug at fara, ikki at koma afturí aftur, ikki í álvara, tí er vón fyri stavn, um at allir føroyingar velja sjálvstýrisleiðina.

Sjálvstýrishugurin hevur flutt seg, breitt seg, men sambandshugur hevur fest seg aftur í Suðurstreym í ávísan mun, møguleikarnir eru avmarkaðir, so meiri álvarsligt og oyðileggjandi í Vágoynni.

Hetta er høttan uttan sannføring, er ikki møgu - ligt, tí er vón um at sjálvstýrisoyggin mikla frá byrjan av av hesum stríði, ikki settur seg sjálva eftir í flokki, nú á mál er um at verða rokkið.

# "Hetjur" eftir Spessa sýndar í Nordurlandahúsinum

**TÍÐINDASKRIV**
*Norðurlandahúsið í Føroyum*

Leygardagin tann 4. mai 2002 kl. 14.00 letur upp fotoframsýningin hjá íslendska Spessa upp í Norðurlandahúsinum.

Hetjurnar hjá ljósmyndamanninum Spessi eru tilkomnir íslendskir sjómenn og heimagangandi húsmøður frá heimbýi hansara, Ísafirði, sum er høvuðsstaður í Vesturfjørðinum.

Spessi sýndi myndarøðina "Hetjur", myndir av monnum, fyrst í 1996 og av konum í 1998. Árið eftir vóru myndirnar sýndar í Finnlandi, og partar av henni hava verið sýndar við úrvali av norðurlendskum samtíðarljósmyndum í USA.

Hugskotið til myndirnar kom, táið Spessi varð biðin um at gera postkort fyri bygdasavni í Ísafirði. Hann gjørdi av at taka myndir av monnum, fráfarnum sjómonnum - monnum ið hava gjørt sær nógvar og drúgvar lívsroyndir. Stjórin á Bygdasavninum varð so hugtikin av myndunum, at tær vóru fyrst sýndar fram í salinum í bygdasavninum - men postkort vóru ongantíð gjørd. Í framhaldi av røðini, tók hann myndir av konum í Ísafirði.

Spessi segði, at tað, ið hetjunar ímynda í dag, er eitt upphav. Orðið (hetja) verður brúkt afturat sum uppískoyti, eins ein undanførsla at býta hetta. Ítrottahetja ella hetja í gerdandisdegnum.

Spessi vil samanbera orðið og hetjuhugmyndina við vanligum fólki, sum hava lívað lívið við virðing. Menninir myndaði hann á einum gomlum sjúkrahúsi, ið ikki longur er í nýtslu. Har gjørdi hann onkra bakgrund bygda á portrettuppstillingar eins og ofta í portrettmálningum, ið vóru í fyrru øld á meginlandinum í Evropa.

Tað vóru gjarna myndir, ið sýndu modell í síni heild, við vøkrum umbúnaði. Tá vísti hann, enn einaferð, til íslendska ljósmyndastovumyndir frá fyrru helvt av 20. øld, har ið leiktjaldið ofta varð sett til síðis, ella afturum modellið. Hann sigur, at myndirnar soleiðis hava verið í umtalu við hesar eldri siðir málverksins og ljósmyndans. Hann lænti gamlar veggjamyndir frá bygdasavninum til at hava í summum myndum. Hann helt áfram við at arbeiða við hesum minninum í huganum av konunum, men tær myndaði hann í gomlum húsið í Ísafirði, har hann gjørdi onkra leikmynd, vid at klæða eitt kamar við hóskiligum tapeti og síðani arbeiddi við tingum/rekvisittum. Fólkið møtti síðani til myndatøkurnar í finasta stási.

Ummælarin á tí amerikanska tíðindablaðnum The New York Times skrivaði, at hetjurøðin hjá Spessa á vári 2001 var tann fyrsta av sínum slagi, og at ljósmyndarin "grundlegði hetjuskapin, á evnuni hjá fólkinum at liva eftir lívsins krøvum."

Spessi er føddur á Ísafirðinum í 1956. Hann las ljósmyndamann á Akademi voor Beeldende Kunst í Hollandi, og verk hansara hava verið sýnd á mongum einstaklinga- og felagssýningum í Íslandi, Svoríki, Finnlandi, Onglandi, Hollandi og Amerika. Nú í apríl hevði hann eina einmansframsýning í Roebling Hall Gallery í New York, har hava verk hansara verið sýnd tríggjar ferðir tvey tey seinastu árini. Harafturat eru myndir hjá Spessa regluliga at síggja í ymiskum tíðarritum.

Til fjølmiðlarnar: Listamaðurin Spessi býr í Norðurlandahúsinum í tíðarskeiðnum 29.04 - 06.05.02 og tá er møguleiki at hitta hann um áhugi er fyri tí.